FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 25. mars 2022
J. nr.: 22/06285
Viðgjørt: AE

Svar til fyrispurning nr. 52-145/2021 frá Steffan Klein Poulsen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Una Rasmussen, um asfaltering við atløgubryggjuna í Hvannasundi

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær verður byrjað at asfaltera við atløgubryggjuna í Hvannasundi?
2. Verða parkeringsbásar eisini gjørdir í hesum sambandi?
3. Væntar landsstýrismaðurin, at ásetta upphædd røkkur til arbeiðið?

Svar
Umstøðurnar skulu verða góðar hjá ferðandi í Føroyum, harímillum eisini parkeringsviðurskifti. Tað eru játtaðar 500 tús. kr. til at asfaltera og merkja upp eitt øki, sum er innanvert atløgubryggjuna í Hvannasundi, har Ritan leggur at. Økið verður brúkt til parkering í sambandi við siglingina hjá Oyggjaleiðum millum Hvannasund, Svínoy og Fugloy.

Landsverk hevur gjørt avtalu við asfaltsveitara um at asfaltera økið, og skal arbeiðið sambært ætlan verða liðugt tíðliga í summar. Landsverk merkir parkeringsbásar, tá liðugt er at asfaltera. Tað kunnu koma seinkingar fyri.

Játtanin á fíggjarlógini røkkur til at asfaltera og at strika básarnar. Landsverk og Hvannasunds kommuna hava avtalað, at kommunan ger og rindar ein part av fyrireikingararbeiðinum, soleiðis at øll verkætlanin er fíggjað.

Tinganes, 25. mars 2022

Uni Rasmussen
Landsstýrismaður í fíggjarmálum